**Ingilín Didriksen Strøm**
**vegna Javnaðarflokkin**

Til Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 52/2019: Uppskot til samtyktar um at banna óneyðugum einnýtisplasti**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at fyrireika og leggja fyri Løgtingið lógaruppskot, sum bannar óneyðugum einnýtisplasti.

**Viðmerkingar**
Í Føroyum, eins og í grannalondum okkara, liva vit í stóran mun av tí, sum havið gevur okkum. Hvørt ár enda nógvar milliónir tons av plasti í havinum, og sambært forsøgnum verður nøgdin av plasti størri enn nøgdin av fiski í 2050. Plastburturkastið, sum endar í náttúruni, er til stóran skaða fyri umhvørvi, djór og menniskju, og vit vita, at tá plast er endað í náttúruni, hvørvur tað ikki aftur í bræði. Tað tekur fleiri hundrað ár at bróta niður plast.

Vit vita eisini frá føroyskum kanningum, at alt størri nøgdir av plasti verða funnar í maganum á fugli. Hetta er eitt tekin um, at skaðiliga útbreiðslan av plasti eisini hevur sett síni spor á føroysku náttúruna. Harafturat vita vit, at stórar nøgdir av plasti enda í náttúruni í sambandi við ymiskt byggivirksemi, sum fer fram.

Havdálking ávirkar ikki bara umhvørvið, vit liva í, men eisini høvuðsvinnuna og við tí búskaparliga grundarlag okkara. ST ásetir í heimsmáli nummar 14 fyri burðardyggari menning, ið snýr seg um lívið í høvunum, at havdálking skal minkast munandi (serliga dálking frá virksemi á landi), og at áðrenn 2025 skal bann verða sett fyri allari havdálking. Hetta mál halda uppskotssetararnir, at vit eisini í Føroyum eiga at seta okkum. Eisini kann vísast á, at í nýggja samgonguskjalinum stendur, at dálking skal loysast fyribyrgjandi.
Nógv av tí plasti, sum endar í havinum, er óneyðugt einnýtisplast. Tí verður hetta uppskotið um at banna óneyðugum einnýtisplasti lagt fyri Løgtingið.

Tá skrivað verður *óneyðugum einnýtisplasti* er tað tí, at tað framvegis verður mett at vera neyðugt við ávísum einnýtisplasti á ávísum økjum, so sum handskum og øðrum, sum fyribyrgir smittu á sjúkrahúsum. Dømi um óneyðugt einnýtisplast er borðbúnaður, lok, súgvirør og vattpinnar, sum ofta endar í náttúruni. Uppskotssetararnir meta, at avvarðandi landsstýrismaður eigur at gera nærri ásetingar hesum viðvíkjandi.

**Á Løgtingi, 22. jan. 2020**

Ingilín Didriksen Strøm